# ELINANDREASEN.DK

## NÝGGJA INNRÆTTING?

Um tú gongur við tonkum um at fáa eina nýggja innrætting av heiminum ella virkinum, ber til at bíleggja eina tíð til eina vitjan, har vit práta um allar spennandi møguleikarnar.

Ring ella skriva til mín sum skjótast, tí eg veri í Føroyum aftur longu í juni.



Tlf.: 0045 2892 9887
kontakt@elinandreasen.dk
www.elinandreasen.dk

# Føroya Heimavirkisfelag

Aðalfundur felagsins verður hósdagin 27. mai 2010 kl. 20.00 í hølum felagsins í J. Paturssonargøtu 24, Tórshavn.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

FØROYA heimavirkis felag

# Summarhús bíliga til sølu

15 min. frá Ålborg. Húsini, sum eru í sera góðum standi, eru 48 m² og grundøkið 1400 m². Alt innbúgv og tvey reiðskapshús fylgja við.

Húsini standa við Limfjørðin.

Ein tíma frá Hanstholm (Norrønu).

Kostnaður kr. 420.000 **Ring 0045-20897262**

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Leiga av fimleikahøll

Tey, sum ætla at leiga fimleikahøllina í Tofta skúla komandi vetur, verða hervið biðin um at senda skrivliga umsókn, til Nes kommunu, Toftavegur 3, FO-650 Toftir, ella nes@nes.fo, í seinasta lagi 13.06.2010.

**Nes kommuna**

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Leiga av svimjihøll

Tey, sum ætla at leiga svimjihøllina í Tofta skúla komandi vetur, verða hervið biðin um at senda skrivliga umsókn, til Nes kommunu, Toftavegur 3, FO-650 Toftir, ella nes@nes.fo, í seinasta lagi 13.06.2010.

**Nes kommuna**

# Sethús í Klaksvík til sølu

Við hesum verður sethúsaognin Kósaskákið 8 (matr.nr. 1014), Klaksvík, lýst til sølu.

Sethúsini eru uml. 30 m² til støddar í trimum hæddum. Grundøkið er uml. 170 m² til støddar.

Eisini er ein frítstandandi hjallur á ognini.

Myndir eru á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo.

Áhugaði kunnu venda sær til Irdi E. Toftegaard, it@lawfirm.fo, ella Jógvan E. Ellefsen.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# Tvingsilssøla

Týsdagin, tann 1. juni 2010, kl. 9:15 verður á Dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 244c, Miðvágur (AS nr. 2-25/2010).

Talan er um vinnubygning og sambært tryggingarskjalinum er bygda økið 300 kvm. Bygningurin er í tveimum hæddum, og er úr timbri og betong, takt við tjørupappi og aluminium.

Bygningurin er nærri innrættaður soleiðis:

**Niðara hæddin:** matstovuhøli (pláss til uml. 100 sitipláss), køkur, 3 toilettir, goymslurúm og trappuuppgongd til ovaru hædd.

**Ovara hæddin:** durur, kunda-wc, gongd, 2 viðgerðarrúm, starvsfólka-wc v/brúsu, venjingarhøli, tekøkur og trappuniðurgongd til niðaru hædd.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 5221801), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

***Føroya Fútarættur***

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Endurlýsing

# Lærarastarv í Dímunar Skúla

Søkt verður eftir útoyggjalærara til Dímunar Skúla. Starvið verður sett frá 1. august 2010.

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Starvið er fulltíðarstarv.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- skal hava regluligt samstarv við ein størri skúla í kommununi ella í økjunum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið skúlaárið 2010/2011.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. mai 2010 .

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

*Tórshavn, 11. mai 2010*

**Mentamálaráðið**

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo**